Virkisskrá Føroya Javnaðarfloks

Í samljóð við grundsjónarmiðini í demokratisku sosialismuni er tað mið og mál javnaðarfloksins at tryggja øllum frælst lív og at beina burtur vesæladóm, ótryggleika, ójavna og órættvísi.

Flokkurin leggur til brots fyri at teknisku og figgjarligu framstigini verða nýtt til at fremja vælferð í landinum og at tryggja vælferð fólksins.

Menniskjan fyrst er ávarpanin í stríðnum fyri sosialismuni. Øll eiga javnbjóðis rættindi uttan mun til vit, trúgv, kyn, uppruna, starv ella inntøku.

Øll nútímans tiltøk og framstig, alt snildi og allir hentleikar, verða skipað við samvinnandi tænastu fyri menniskjuna, samfelagið — alt fólkið sum einstaklingin og heildina.

Ávøksturin má sostatt ikki koma nøkrum fáum einstaklingum til góðar, men øllum forbrúkarum, allari teirri luttakandi arbeiðandi fjøldini eins og teimum vegna sjúku, avlemi og á annan hátt evnaligu skerdu í samfelagnum.

Ein útbyggjan av okkara vinnulívi á sjógvi og landi, at skapa arbeiði til øll, er aðaltakið.

Hetta verður støðið, sum vælferðarsamfelagið skal byggjast á og trygdin fyri sosialu og mentunarligu framstigini, ið gjørd eru, og sum Føroya Javnaðarflokkur vil verja og bera víðari.

1. Arbeiðsviðurskifti

Arbeiðara- og fiskimanna rættur at vera umboðaður í leiðsluni av virkjum og íognarrættur teirra til hesi verður skrásettur.

Eykapensión arbeiðaranna (ATP) verður at fremja, galdandi fyri fiskimenn eisini.

Sama løn og javnrættur til arbeiðis fyri kvinnur og menn verður at fremja.

Lønarkor fiskimansins verða við minstuløn, prísviðbót og øðrum tiltøkum tryggjað at liggja á einum stigi, ið samsvarar lønarlagnum annars, samstundis sum eykaløn verður tryggjað orsakað av stravna og vandamikla arbeiði teirra.

Til tryggjan av heilsuni og arbeiðsmanna vælferð undir arbeiðnum verður at hava álitismannaskipan fyri allar starvandi við álitismonnum á øllum arbeiðsplássum.

Tað er samfelagsins skylda at hava eftirlit við øllum arbeiðsplássum og at arbeiðsligu krøv, sum hin arbeiðandi eigur rætt til at fáa uppfylt, verða framd gjøgnum lóggávu.

Flokkurin mótmælir føstum gerðarætti. Vinnufeløgini skipa sjálvi sín arbeiðsrætt.

Útbúgving av handverkarum verður at rokna ájavnt við aðra útbúgving.

Arbeiðsloysisstudningur verður at fremja.

2. Heilsu og sosialmál

Flokkurin verður at halda fram við teirri útbygging av sosiallóggávuni, sum higartil er framd.

Sosialvegleiðingin eigur at verða útbygd, so at øll lættliga kunnu søkja sær ráð.

Revalideringin eigur at útbyggjast soleiðis, at tey, sum tørva hjálp, fáa hana, har sum tey búgva.

Øll neyðug sosial hjáplartiltøk eiga at verða sett í verk so skjótt sum samfelagsbroytingarnar krevja tað.

Øll læknahjálp og heilivágur verða ókeypis.

Bygging av ellis- og røktingarheimum verður at fremja um landið eins og stuðlað verður til stovnan av barnagørðum og vøggustovum.

Flokkurin leggur áherðslu á, at framd verður almenn trygging, soleiðis at vanlukkutrygging, sjúkradagpeninganøgd og arbeiðsloysistrygd verður skipað undir einum.

3. Fiskimark — veiðumøguleikar

Fiskimarkið skal fevna landgrunnin allan.

Flokkurin leggur doyin á at virka fyri størst møguligum veiðurættindum á øðrum leiðum, fjart og nærri. Ti verða hesi undir samráðingum við íslendingar, grønlendingar, bretar, norðmenn og aðrar tjóðir, at verja.

Allastaðni tað er møguligt, verður føroysk umboðan á fundum, har havrættindi er til viðgerðar, so vit mest møguligt virka fyri, at rættarviðurskifti og fiskirættindi verða skipað so, at lond, har fiskivinnan hevur avgerandi týdning í búskapinum, eiga serrættindi.

Flokkurin vil framvegis krevja fiski-, bú- og virkisrætt í Grønlandi, á sama hátt sum grønlendingar sambært ríkisfelagsskapin hava í Føroyum.

4. Vaktar- og bjargingartænastan

Sjóverjan verður útbygd við føroyskum vaktarhaldi og politimyndugleika.

Samarbeiðið millum danir og føroyingar á hesum øki verður útbygt, og áherðsla verður løgd á at fáa útbygt og umlagt danska partin av sjóverjuni.

Somuleiðis verður helikoptara- og flogfaratænastan økt.

Føroyska bjargingartænastan verður útbygd og bjargingarfeløgini stuðlað.

5. Virkispolitikkur — ídnaður

Her er talan bæði um fiskivinnu og ídnað.

Fiskivinnan er ressmál, og skal landið ganga á odda bæði við útbyggjan og rakstri. Einstaklingar og fiskimanna- og aðrar fyritøkur, sum fara undir byggjan av høskandi fiskifórum, verða í byrjanini hjálptir ávegis við studningi og annars við lagaligum lánum.

Annar ídnaður verður at seta á stovn á landsgrundarlagi — men fólk, sum hava hegni og áræði og sum vilja royna nýggjar leiðir, kunnu fáa lagalig lán og studning til stovnsetan og rakstur í byrjanini.

Miðvís útbyggingarætlan verður gjørd og verður dentur lagdur á landspartamenning. Verða tí at seta á stovn størri og smærri ídnaðarvirki, ikki bert á stórplássunum, men eisini á bygdunum kring landið, soleiðis at føroyska búsetingarmynstrið verður varðveitt. Tað skal verða møguligt at veita betri stuðul til teir landspartar og tær bygdir, sum eru ringast fyri.

Hildið verður áfram við útbúgving teirra, ið starvast innan ídnað.

Floksins mál er at leggja so til rættis, at allur okkara útfluttningur skal vera tilvirkaður her á landi.

Nýggjar vinnugreinir verða framdar, so vinnulívið verður so fjøllbroytt sum gjørligt. Dentur verður lagdur á, at tey sum vinnuliga eru ringast fyri á henda hátt fáa betri arbeiðsmøguleikar — serstakliga verður hugsað um kvinnurnar.

6. Farmaskip

Flokkurin setur sær sum mál at skapa ein tíðarhóskandi farmaskipaflota til allar okkara farmasiglingarmenn.

7. Skipabygging

Tað er floksins mál peningaliga og virkisliga at skipa so fyri, at okkara fólk í størri og størri mun byggir egnu skip og skip fyri aðrar eisini. Samarbeiði og samskipan skipasmiðjurnar millum verður at fremja til tess at rationalisera skipabyggingina.

Fyri at tryggja skipasmiðjunum javnt arbeiði, og til tess at tryggja eina javna endurnýggging av skipaflotanum, skal almennur stovnur kunna gera byggisáttmálar um raðbygging.

8. Landbúnaður

Týdningurin av at land okkara verður dyrkað, so tað kann geva mest møguligt av kjøti, mjólk, grønmeti og aðrari livgevandi føðslu, ásannast.

Mál okkara má tí vera at skipa so fyri, at vit kunnu framleiða nóg mikið av hesum búnaðarvørum til okkum sjálvi og harvið ikki bara gagna okkara heilsu, men spara allan tann pening, ið nú fer út av landinum fyri hesar vørur.

Skipað verður fyri, at jørðin verður at koma fólkinum á staðnum til nyttu og at jarðbrúkini fáa hóskandi støddd, so landbúnaðurin gerst ein meira lønandi vinna.

Stuðlað verður til at fara undir samvinnubrúk og landsfelagsskapi fyri tílíkar.

10. Skattaviðurskifti

Samfelagið verður at fáa sær tørvandi inntøkur á ein hátt, at øll hjálpa til eftir førimuni. Jú størri ágóða ein hevur, tess meira eigur ein at lata frá sær til samfelagið.

Hetta verður gjørt lutvíst við at skipa fyri nýtsluskatti og lutvís við beinleiðis inntøkuskatti, sum verður skipaður sum kelduskattur. Sum lámark fyri inntøkuskattinum verður sett tann inntøka, sum vanligur arbeiðsmaður ella fiskimaður hevur, og sum viðbót fyri tað, sum nýtsluskatturin nervar stórar familjur, verður veittur studningur í mun til barnatalið.

Arbeitt verður fyri at breiðka skattagrundarlagið, so samfelagsskaptu virðini koma fjøldini til góðar; hetta gerst m. a. við eini rímiligari skatting av inntøkum, har arbeiði ikki liggur aftanfyri, so sum sølu av ogn og øðrum.

Tryggjað verður at kommunur skatta borgarar í somu korum javnt og arbeitt verður fyri javning í inntøkugrundarlagi kommununnar.

Skattaeftirlitið verður at gera strangari, so tær inntøkur, sum nú sleppa undan, koma tram.

Rímiligar avmarkingar í avskrivingarrætti einstaklingsins verða at seta í gildi.

11. Samferðslan

Landið átekur sær alla ferðslu, sjó,- land- og loftvegis, og verður hon samskipað til eina samvirkandi heild við tí endamáli, at fáa dagligt samband bygdanna millum og við útheimin. Til tess at veita øllum ráð at ferðast, verða at fáa í lag avsláttarskipan fyri familjur, tey eldru, skúlabørn og ítróttarungdóm.

Vørufluttningurin verður skipaður soleiðis, at fjarskotnar bygdir fáa eins bíligar vørur, sum aðrar bygdir fáa.

Havna-, lendinga- og vegagerðin verður at fullfiggja um alt landið.

Flogvallarviðurskiftini verða bøtt beinan vegin, og miðvís útbygging verður at fremja.

12. Rættarviðurskifti

Øllum íbúgvum landsins verður tryggjað at nýta rættin sær til verju.

Sakførsla verður tí ókeypis hjá ómúgvandi.

13. Skúli og uppaling

Øll skulu hava javnbjóðis rætt til lærdóms uttan mun til figgjarviðurskifti og til hvar ein í landinum býr. Sambært hetta verður at seta í verk tíðarhóskandi skúlaskipan, sum ikki gerr mun á næmingunum. Núgaldandi skipan við real- og 8., 9. og 10. skúlaársbólkum verður at umskipa, soleiðis at næmingarnir fáa undirvísing í tí, teir hava hug og evni til. Fyri at loysa hesa uppgávu verður valskúli at seta á stovn.

Útbúgving teirra í 16—19 ára aldri má verða ein skúla- og vinnuútbúgving fyri øll og eigur at fevna slíkan almennan lærdóm, at ongin verður skerdur í at ogna sær víðari læru.

Fyri at fáa hin besta trivna í skúlanum verður barnagarðsflokkur at skipa.

Ístaðin fyri at næmingarnir skulu taka prógv verður miðað ímóti eini skipan, har skúlin gevur frágreiðing um næmingin. Skúlaboku vera ókeypis.

So leingi málið um ókeypis lærdóm ikki er rokkið, verður stuðul til skúlagongd latin eftir tørvi og ikki bundin av skattaviðurskiftum foreldranna.

Lætt verður um kostnaðin hjá

